Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	03.11.2023
Mál nr.:	23/02889
Málsviðgjørt:	TM
Ummælistíð:	14. august til 4. september 2023
Eftirkannað:	24. juli 2023/ 24. oktobur 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi
(Avgjøld á f-gass og ávísar rættingar í vørunumrum og øðrum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 15. mars 2018, verður frumskjal 1 í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi orðað sum ásett í skjali 1.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Skjal 1

“

Frumskjal 1 til toll- og vøruskránna

Vøru nr.	Punkt avgjald	Punkt avgjald	Vøruslag
Kap. 17:			
1704.10.10	40%	16,00 kr. pr. kg.	Tyggigummi undir 60 vektprosent sukur
1704.10.90	40%	16,00 kr. pr. kg.	Tyggigummi yvir 60 vektprosent sukur
1704.90.10	40%	16,00 kr. pr. kg.	Lakresevja
1704.90.30	40%	16,00 kr. pr. kg.	Hvít sjokuláta
1704.90.53	40%	16,00 kr. pr. kg.	Vørur av marcipan undir 2 kg netto
1704.90.55	40%	16,00 kr. pr. kg.	Hálsbomm
1704.90.61	40%	16,00 kr. pr. kg.	Søtmeti (drageevørur)
1704.90.65	40%	16,00 kr. pr. kg.	Gummibomm
1704.90.71	40%	16,00 kr. pr. kg.	Bomm
1704.90.75	40%	16,00 kr. pr. kg.	Karamellur
1704.90.81	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sukurtablettir
1704.90.92	40%	16,00 kr. pr. kg.	Lakresvørur
1704.90.95	40%	16,00 kr. pr. kg.	Nougat undir 2 kg netto
1704.90.99	40%	16,00 kr. pr. kg.	Annað søtmeti
Kap. 18:			
1806.10.15	40%	16,00 kr. pr. kg.	Kakaopulvur undir 5 vektprosent sukur
1806.10.20	40%	16,00 kr. pr. kg.	Kakaopulvur yvir 5 vektprosent sukur
1806.10.30	40%	16,00 kr. pr. kg.	Kakaopulvur yvir 65 vektprosent sukur
1806.10.90	40%	16,00 kr. pr. kg.	Kakaopulvur yvir 80 vektprosent sukur
1806.31.00	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokulátapláta fylt
1806.32.10	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokulátapláta við frukt og nøtum
1806.32.90	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokulátapláta uttan fyllu
1806.90.11	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokuláta við alkohol
1806.90.19	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokuláta konfekt

1806.90.31	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokuláta við fyllu, t.d. Mars, creme egg
1806.90.39	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokuláta uttan fyllu, t.d. Páskaregg, sjokulátaknappar
1806.90.50	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokuláta, sí kap. 1704
1806.90.60	40%	16,00 kr. pr. kg.	Smyrjisjokuláta
1806.90.70	40%	16,00 kr. pr. kg.	Kakaopulvur at drekka
1806.90.90	40%	16,00 kr. pr. kg.	Sjokulátasós
Kap. 19:			
1905.31.11	13%	14,00 kr. pr. kg.	Søtar keks, biscuits
1905.31.19	13%	14,00 kr. pr. kg.	Bakstur, t.d. Makrónir
1905.31.91	13%	14,00 kr. pr. kg.	Tvíkeks við krem
1905.31.99	13%	14,00 kr. pr. kg.	Bakstur
1905.32.05	13%	14,00 kr. pr. kg.	Vaflur
1905.32.11	13%	14,00 kr. pr. kg.	Sjokulátavaflur pakn. undir. 85 gr.
1905.32.19	13%	14,00 kr. pr. kg.	Ísvaflur
1905.32.91	13%	14,00 kr. pr. kg.	Vaflur saltar
1905.32.99	13%	14,00 kr. pr. kg.	Vaflur
1905.40.90	0	1,00 kr. pr. kg.	Tvebakkar o.a.
1905.90.30	0	1,00 kr. pr. kg.	Glutenbreyð
1905.90.55	30%	12,00 kr. pr. kg.	Snacks
Kap. 20:			
2005.20.20	30%	12,00 kr. pr .kg.	Kips
Kap. 21:			
2106.90.11	0	12 kr. pr. ltr	Leskidryksúrdráttur
2106.90.19	0	12 kr. pr. ltr	Leskidryksúrdráttur við sukur
Kap. 22:			
2202.10.18	0	2,00 kr. pr. ltr.	Light sodavatn
2202.10.19	0	2,00 kr. pr. ltr.	Sodavatn
2203.00.05	0	180,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Øl yvir 5,8%
2203.00.10	0	10,00 kr. pr. ltr.	Øl yvir 4,6%
2203.00.20	0	7,60 kr. pr. ltr.	Øl yvir 2,8%
2204.10.11	0	24,00 kr. pr. ltr.	Brúsandi vín, Champagne

2204.10.13	0	24,00 kr. pr. ltr.	Cava
2204.10.15	0	24,00 kr. pr. ltr.	Prosecco
2204.10.91	0	24,00 kr. pr. ltr.	Brúsandi vín, Asti spumante
2204.10.93	0	24,00 kr. pr. ltr.	Gosvín
2204.10.94	0	24,00 kr. pr. ltr.	Gosvín
2204.10.96	0	24,00 kr. pr. ltr.	Gosvín
2204.10.98	0	24,00 kr. pr. ltr.	Gosvín
2204.21.06	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.21.07	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.21.08	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.21.09	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.21.11	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.21.12	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bordeaux hvítvín
2204.21.13	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bourgogne hvítvín
2204.21.17	0	24,00 kr. pr. ltr.	Val de Loire Hvítvín
2204.21.18	0	24,00 kr. pr. ltr.	Mosel hvítvín
2204.21.19	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.22	0	24,00 kr. pr. ltr.	Rheinhessen hvítvín
2204.21.23	0	24,00 kr. pr. ltr.	Tokaj hvítvín
2204.21.24	0	24,00 kr. pr. ltr.	Lazio hvítvín
2204.21.26	0	24,00 kr. pr. ltr.	Toscana hvítvín
2204.21.27	0	24,00 kr. pr. ltr.	Trentino, Alto Adige og Friuli
2204.21.28	0	24,00 kr. pr. ltr.	Veneto hvítvín
2204.21.31	0	24,00 kr. pr. ltr.	Sicilla
2204.21.32	0	24,00 kr. pr. ltr.	Vinho Verde hvítvín
2204.21.34	0	24,00 kr. pr. ltr.	Penedés hvítvín
2204.21.36	0	24,00 kr. pr. ltr.	Rioja hvítvín
2204.21.37	0	24,00 kr. pr. ltr.	Valencia hvítvín
2204.21.38	0	24,00 kr. pr. ltr.	Reyðvín
2204.21.42	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bordeaux reyðvín
2204.21.43	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bourgogne reyðvín
2204.21.44	0	24,00 kr. pr. ltr.	Beaujolais reyðvín
2204.21.46	0	24,00 kr. pr. ltr.	Cotes du Rhone reyðvín

2204.21.47	0	24,00 kr. pr. ltr.	Languedoc Roussillon reyðvín
2204.21.48	0	24,00 kr. pr. ltr.	Val de Loire reyðvín
2204.21.61	0	24,00 kr. pr. ltr.	Sicilla
2204.21.62	0	24,00 kr. pr. ltr.	Piemonte reyðvín
2204.21.66	0	24,00 kr. pr. ltr.	Toscana reyðvín
2204.21.67	0	24,00 kr. pr. ltr.	Trentino og Alto Adige reyðvín
2204.21.68	0	24,00 kr. pr. ltr.	Veneto reyðvín
2204.21.69	0	24,00 kr. pr. ltr.	Dao, Bairrada og Douro reyðvín
2204.21.71	0	24,00 kr. pr. ltr.	Navarra reyðvín
2204.21.74	0	24,00 kr. pr. ltr.	Penedés reyðvín
2204.21.76	0	24,00 kr. pr. ltr.	Rioja reyðvín
2204.21.77	0	24,00 kr. pr. ltr.	Valdepenas reyðvín
2204.21.78	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.79	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.80	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.81	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.82	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.83	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.84	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.21.85	0	41,00 kr. pr. ltr.	Madeira og Moscatel du Setúbal
2204.21.86	0	41,00 kr. pr. ltr.	Sherry heitvín
2204.21.87	0	41,00 kr. pr. ltr.	Marsalavin heitvín
2204.21.88	0	41,00 kr. pr. ltr.	Samosvin og Muskat heitvín
2204.21.89	0	41,00 kr. pr. ltr.	Portvín
2204.21.90	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.21.91	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.21.93	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.94	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.95	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.96	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.97	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.21.98	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.10	0	24,00 kr. pr. ltr.	Vín í fløsku við champagneproppi

2204.22.22	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bordeaux
2204.22.23	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bourgogne
2204.22.24	0	24,00 kr. pr. ltr.	Beaujolais
2204.22.26	0	24,00 kr. pr. ltr.	Vallée du Rhône
2204.22.27	0	24,00 kr. pr. ltr.	Languedoc-Roussillon
2204.22.28	0	24,00 kr. pr. ltr.	Val de Loire (Loiredalen)
2204.22.32	0	24,00 kr. pr. ltr.	Piemonte
2204.22.33	0	24,00 kr. pr. ltr.	Tokaj
2204.22.38	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.78	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.79	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.80	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.81	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.82	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.83	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.84	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.85	0	41,00 kr. pr. ltr.	Madeira og Moscatel de Setúbal
2204.22.86	0	41,00 kr. pr. ltr.	Sherry
2204.22.88	0	41,00 kr. pr. ltr.	Samosvín og Muskat frá Lemnos
2204.22.90	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.22.91	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.22.93	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.94	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.95	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.96	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.97	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.22.98	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.10	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.19	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.29.22	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bordeaux
2204.29.23	0	24,00 kr. pr. ltr.	Bourgogne
2204.29.24	0	24,00 kr. pr. ltr.	Beaujolais
2204.29.26	0	24,00 kr. pr. ltr.	Vallée du Rhône

2204.29.27	0	24,00 kr. pr. ltr.	Languedoc-Roussillon
2204.29.28	0	24,00 kr. pr. ltr.	Val de Loire (Loiredalen)
2204.29.32	0	24,00 kr. pr. ltr.	Piemonte
2204.29.38	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.78	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.79	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.80	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.81	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.82	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.83	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.84	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.29.85	0	41,00 kr. pr. ltr.	Madeira og Moscatel du Setúbal
2204.29.86	0	41,00 kr. pr. ltr.	Sherry heitvín
2204.29.88	0	41,00 kr. pr. ltr.	Samosvin og Muskat frá Lemnos
2204.29.90	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.29.91	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín
2204.29.93	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.94	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.95	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.96	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.97	0	24,00 kr. pr. ltr.	Hvítvín
2204.29.98	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.30.10	0	24,00 kr. pr. ltr.	Drúumost
2204.30.92	0	24,00 kr. pr. ltr.	Drúumost konsentrerað
2204.30.94	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2204.30.96	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín konsentrerað
2204.30.98	0	24,00 kr. pr. ltr.	Borðvín
2205.10.10	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín undir 18% undir 2 ltr.
2205.10.90	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín yvir 18% undir 2 ltr.
2205.90.10	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín undir 18% yvir 2 ltr.
2205.90.90	0	41,00 kr. pr. ltr.	Heitvín yvir 18% yvir 2 ltr.
2206.00.31	0	180 kr. pr. litur	Súreplacider og perucider
2206.00.39	0	180 kr. pr. litur	Cider

2206.00.51	0	180 kr. pr. litur	Súreplacider og perucider
2206.00.59	0	180 kr. pr. litur	Cider
2206.00.81	0	180 kr. pr. litur	Súreplacider og perucider
2206.00.89	0	180 kr. pr. litur	Cider
2206.00.90	0	180 kr. pr. litur	Súreplavín o.a.
2208.20.12	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Cognac
2208.20.14	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Armagnac
2208.20.26	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Grappa
2208.20.27	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Brandy de Jerez
2208.20.29	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Singami, Pisco o.tl.
2208.20.40	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rådestillat
2208.20.62	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Cognac yvir 2 litrar
2208.20.64	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Armagnac yvir 2 litrar
2208.20.86	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Grappa yvir 2 litrar
2208.20.87	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Brandy yvir 2 litrar
2208.20.89	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Singami, Pisco o.tl. yvir 2 ltr.
2208.30.11	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky
2208.30.19	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky yvir 2 litrar
2208.30.30	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Single malt whisky
2208.30.41	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Blended malt whisky
2208.30.49	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Blended malt whisky yvir 2 litrar
2208.30.61	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Single grain whisky

2208.30.69	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Single malt whisky yvir 2 litrar
2208.30.71	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky
2208.30.79	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky yvir 2 litrar
2208.30.82	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky
2208.30.88	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky yvir 2 litrar
2208.40.11	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rom
2208.40.31	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rom
2208.40.39	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rom
2208.40.51	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rom yvir 2 litrar
2208.40.99	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rom
2208.50.11	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Gin
2208.50.19	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Gin yvir 2 litrar
2208.50.91	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Genever
2208.50.99	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Genever yvir 2 litrar
2208.60.11	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Vodka 45,4% vol ella undir
2208.60.19	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Vodka 45,5% vol yvir 2 litrar
2208.60.91	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Vodka yvir 45,4% vol
2208.60.99	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Vodka yvir 45,4% vol yvir 2 litrar
2208.70.10	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Likør undir 2 litrar
2208.70.90	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Likør yvir 2 litrar

2208.90.10	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Akvavitt og snaps
2208.90.11	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Arrak undir 2 litrar
2208.90.19	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Arrak yvir 2 litrar
2208.90.33	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Akvavitt undir 2 litrar
2208.90.38	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Akvavitt yvir 2 litrar
2208.90.41	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Ouzo
2208.90.45	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Calvados
2208.90.48	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Fruktsnapsur
2208.90.54	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Tequila
2208.90.56	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Akvavitt
2208.90.69	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky-soda
2208.90.71	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Fruktsnapsur yvir 2 litrar
2208.90.75	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Tequila yvir 2 litrar
2208.90.77	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Akvavitt
2208.90.78	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Whisky-soda
2208.90.90	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Aðrar vørur, ið innihalda rúsdrekka
2208.90.91	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rúsdrekka undir 2 litrar
2208.90.99	0	330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol	Rúsdrekka yvir 2 litrar
Kap. 24:			
2402.10.00	0	100 stk. 175,00 kr.	Sigarir, seruttir, sigarillir
2402.20.10	0	100 stk. 145,00 kr.	Sigarettir við kryddernelik
2402.20.90	0	100 stk. 145,00 kr.	Sigarettir

2402.90.00	0	100 stk. 145,00 kr.	Sigarettir
2403.11.00	0	215,00 kr. pr. kg.	Vatnpípu tubbak
2403.19.10	0	215,00 kr. pr. kg.	Roykitubbak undir 500 gr.
2403.19.90	0	215,00 kr. pr. kg.	Roykitubbak
2403.91.00	0	215,00 kr. pr. kg.	Endurvunnið tubbak
2403.99.10	0	144,00 kr. pr. kg.	Skrá og snús
2403.99.90	0	144,00 kr. pr. kg.	Tobaksekstrakter v.m.
Kap. 27:			
2710.12.41	0	2,40 kr. pr. ltr.	Blýfrítt bensin undir 0,013 gr. pr. ltr. oktan undir 95
2710.12.45	0	2,40 kr. pr. ltr.	Blýfrítt bensin undir 0,013 gr. pr. ltr. oktan undir 98
2710.12.49	0	2,40 kr. pr. ltr.	Blýfrítt bensin undir 0,013 gr. pr. ltr. oktan yvir 98
2710.12.51	0	2,40 kr. pr. ltr.	Blýggjað bensin yvir 0,013 gr. pr. ltr. undir oktan 98
2710.12.59	0	2,40 kr. pr. ltr.	Blýggjað bensin yvir 0,013 gr. pr. ltr. yvir oktan 98
2710.12.90	0	0,80 kr. pr. ltr.	Lættar oljur
2710.19.21	0	0,50 kr. pr. ltr.	Jetpetroleum
2710.19.25	0	0,60 kr. pr. ltr.	Petroleum
2710.19.29	0	0,60 kr. pr. ltr.	Paraffin olja
2710.19.43	0	0,50 kr. pr. ltr.	Dieselolja svávul undir 0,001 v%
2710.19.46	0	0,50 kr. pr. ltr.	Dieselolja svávul yvir 0,001 v%
2710.19.81	0	0,70 kr. pr. ltr.	Ljós smyrjiolja
2710.19.83	0	0,70 kr. pr. ltr.	Hydraulikolja
2710.19.85	0	0,70 kr. pr. ltr.	Hvítar oljur, paraffinum liquidum
2710.19.87	0	0,70 kr. pr. ltr.	Gearolja
Kap. 28:			
2812.90.10	0	550,00 kr. pr. kg.	Svávul hexaflourid (SF_6) GWP = 23.500
Kap. 29:			
2903.42.00	0	95,00 kr. pr. kg	Difluormethan HFC-32

			GWP = 677
2903.44.11	0	444,00 kr. pr. kg.	Pentafluorethan HFC-125 GWP = 3.170
2903.44.12	0	46,00 kr. pr. kg.	1,1,2-trifluorethan HFC-143 GWP = 328
2903.44.13	0	672,00 kr. pr. kg.	1,1,1-trifluorethan HFC-143a GWP = 4.800
2903.45.12	0	182,00 kr. pr. kg.	1,1,1,2-tetrafluorethan HFC-134a GWP = 1.300
Kap. 38:			
3827.61.10	0	552,00 kr. pr. kg.	Blandingur R404A inniheldur 52% 1,1,1-trifluorethan (HFC-143a), 44% pentafluorethan (HFC-125) og 4% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a) GWP = 3.943
3827.61.40	0	558,00 kr. pr. kg.	Blandingur R507A inniheldur 50% pentafluorethan (HFC-125) og 50% 1,1,1-trifluorethan (HFC-143a) GWP = 3.985
3827.62.20	0	346,00 kr. pr. kg.	Blandingur R422D inniheldur 65,1% pentafluorethan (HFC-125), 31,5% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a) og 3,4% isobutan GWP = 2.473
3827.63.10	0	269,00 kr. pr. kg.	Blandingur R410A inniheldur 50% pentafluorethan (HFC-125)og 50% difluormethan (HFC-32) GWP = 1.924
3827.64.10	0	227,00 kr. pr. kg.	Blandingur R407C inniheldur 52% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a), 25% pentafluorethan (HFC-125) og 23% difluormethan (HFC-32) GWP = 1.624
3827.64.20	0	234,00 kr. pr. kg.	Blandingur R407F inniheldur 40% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a), 30% difluormethan (HFC-32) og 30% pentafluorethan (HFC-125) GWP = 1.674

3827.65.20	0	179 kr. pr. kg.	Blandingur R449A inniheldur 25,7% 1,1,1,2-tetrafluorethan (HFC-134a), 25,3% 2,3,3,3-tetrafluorpropen (HFC-1234yf), 24,7% pentafluorethan (HFC-125) og 24,3% difluormethan (HFC-32) GWP = 1.282

”

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur sett sær fyri at seta í gildi lóggávu í Føroyum um avgjøld á innflutning av f-gassi galdandi frá 1. januar 2024. Kunngerð um f-gass er eisini lýst og sett í gildi, sum eftir ætlan fer at minka nýtslu og innflutning av f-gassi við 85% fram til 2036 (kunngerð nr. 110 frá 16. oktober 2023 um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, sum inniheldur fluor, F-gasskunngerðin. Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum umsitur umhvørvisverndarlógina, sum heimilar ta kunngerðina.

Avgjøldini á innflutning av f-gassi og kunngerðin um f-gass skulu síggjast sum ein samlað lóggáva við endamálinum at minka samlaðu nýtsluna og útlátið av f-gassi.

Høvuðsorsøkin til hetta uppskotið og til ætlaðu kunngerðina um f-gass er, at Føroyar hava bundið seg til altjóða Wien-sáttmálan um verju av ozonlagnum frá 1985 og til Montreal-protokollina um ozonoyðandi evni frá 1987. Montreal-protokollin hevur fingið fleiri ískoyti, undir hesum Kigali-ískoytið frá 2016 um útfasing av HFC-gassi, sum er ein bólkur av f-gassi.

HFC-gass eru sterk vakstrarhúsgass, sum sambært Kigali-ískoytinum skulu útfasast fyri at verja jørðina móti mannaskaptum veðurlagsbroytingum.

Hin orsøkin er, at Løgtingið hin 5. mai 2022 samtykti, at Føroyar skulu minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30% næstu 10 árini. Málið skal røkkast við 25 átøkum, har f-gass er nevnt og fevnt av átaki 18 og 19 í orku- og veðurlagspolitikkinum. Kunngerðin um f-gass og avgjøldini á innflutning av f-gassi eru tí liður í at røkka mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Grannalondini hava sett líknandi reglur og lóggávu í gildi.

Vísast kann eisini til løgtingsmál 130/2021: Uppskot til samtyktar um mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi komandi 10 árini og uppskot til dagførdan orku- og veðurlagspolitikk.

Harafturat eru í lógaruppskotinum nakrar rættingar til skjal 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Rættingarnar eru sambært tilmæli frá TAKS.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 15. mars 2018. Viðvíkjandi avgjøldum á innflutning av f-gassi eru eingi avgjøld eftir galdandi lóggávu. Grannalondini hava sett lóggávu um avgjøld á innflutning av f-gassi í gildi.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at seta í gildi lóggávu í Føroyum um avgjøld á innflutning av f-gassi galdandi frá 1. januar 2024 og við hesum at minka innflutning av f-gassi.

Føroyar hava bundið seg til altjóða Wien-sáttmálan um verju av ozonlagnum frá 1985 og til Montreal-protokollina um ozonoyðandi evni frá 1987.

Løgtingið samtykti hin 5. mai 2022, at Føroyar skulu minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30% næstu 10 árini. Málið skal røkkast við 25 átøkum, har f-gass er nevnt og fevnt

av átaki 18 og 19 í orku- og veðurlagspolitikkinum. Kunngerðin um f-gass og avgjøldini á innflutning av f-gassi eru tí liður í at røkka mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi.

Endamálið við uppskotinum er eisini at seta hesar samtyktir og ásetingar í verk. Harafturat er endamálið at seta í verk nakrar rættingar til skjal 1 í løgtingslógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður avgjald lagt á innflutning av f-gassi, sum verður brúkt í køli- og frystiskipanum. Sambært uppskotinum verður avgjaldið áleið á sama stigi pr. kg. av innflutningi sum í grannalondunum. Harvið vera avgjøldini ikki kappingaravlagandi.

Nýtt frumskjal 1 í skjali 1 verður sett í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við seinni broytingum. Í frumskjali 1 eru gjørdar ávísar rættingar, umframt at f-gassini eru sett inn í kapitlarnar 28, 29 og 38 í frumskjali 1. Rættingarnar til frumskjal 1 í skjali 1 í lógini eru gjørdar sambært tilmæli frá TAKS og í samráði við TAKS. Rættingarnar til frumskjal 1, sum eru gjørdar í samráði við TAKS, eru lýstar niðanfyri:

<u>Striking av gatt-tolli í Frumskjali 1 í skjali 1</u>
Í Frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi er gatt-tollur á 4,7 % og 3,7 % lýstur fyri nakrar vørur í vørubólki 2710, sum er oljuúrdráttir. Gatt-tollurin er lýstur í næstu kolonnu undir punkt avgjald. Mett verður, at talan er um ein feil, sum er gjørdur í sambandi við eina lógarbroyting. Gatt-tollur skal ikki lýsast í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Gatt-tollur skal av røttum lýsast í løgtingslóg um toll. Viðmerkjast skal, at í hesum føri er gatt-tollur lýstur fyri vørurnar í løgtingslóg um toll.

Eftir uppskotinum verður gatt-tollurin á 4,7% í Frumskjali 1 í skjali strikaður fyri niðanfyristandandi vørunr.:

2710.12.41, Blýfrítt bensin undir 0,013 gr.pr. ltr. oktan undir 95.
2710.12.45, Blýfrítt bensin undir 0,013 gr.pr. ltr. oktan undir 98.
2710.12.49, Blýfrítt bensin undir 0,013 gr.pr. ltr. oktan yvir 98.
2710.12.51, Blýggjað bensin yvir 0,013 gr.pr. ltr. undir oktan 98.
2710.12.59, Blýggjað bensin yvir 0,013 gr.pr. ltr. yvir oktan 98.
2710.12.90, Lættar oljur
2710.19.25, Petroleum
2710.19.29, Paraffin olja

Eftir uppskotinum verður gatt-tollurin á 3,7% í Frumskjali 1 í skjali 1 á niðanfyristandandi vørunr. eisini strikaður:

2710.19.81 Ljós smyrjiolja
2710.19.83 Hydraulikolja
2710.19.85 Hvítar oljur, paraffinum liquidum
2710.19.87 Gearolja

<u>Sundurbýting av avgjaldi á smyrjioljum</u>
Avgjald á vørunr. 2710.19.81, ljós smyrjiolja, 2710.19.83, hydraulikolja, 2710.19.85, hvítar oljur, paraffinum liquidum og 2710.19.87, gearolja er lýst í bæði løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og í løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju. Avgjaldið hevur

samlað sæð verið 3,20 kr. pr. ltr. Avgjaldið hevur verið býtt soleiðis, at 0,70 kr. pr. ltr. koma frá løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og 2,50 kr. pr. ltr. koma frá løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju.

Tá ið løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi bleiv broytt í 2015, varð avgjaldið á smyrjiolju broytt frá 0,70 kr. pr. ltr. til 2,70 kr. pr. ltr. Tað framgongur tó ikki av viðmerkingunum til lógarbroytingina, at avgjaldið á smyrjiolju skuldi hækkast. Talan er óivað um ein feil, sum er gjørdur í sambandi við lógarbroytingina. Viðmerkjast skal, at TAKS eisini aftaná lógarbroytingina hevur kravt inn 3,20 kr. pr. ltr., og at Fíggjarmálaráðið er kunnað um hetta.

Eftir uppskotinum verður avgjaldið í Frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi broytt til 0,70 kr. pr. ltr. fyri hesi vørunr.:

2710.19.81 Ljós smyrjiolja
2710.19.83 Hydraulikolja
2710.19.85 Hvítar oljur, paraffinum liquidum
2710.19.87 Gear olja

Nágreining av rúsdrekka í Frumskjali 1 í skjali 1
Rúsdrekka, sum kemur undir vørunr. 2208.20.12 til 2208.90.99, hevur avgjald á 330 kr. pr. ltr. Í lógini frá 2002 varð ásett, at avgjaldið skuldi vera 330 kr. pr. ltr. reint alkohol. Setningurin "reint alkohol" er onkursvegna blivin strikaður, tá ið broytingar eru gjørdar í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Nevnt er ikki í viðmerkingunum til broytingarnar, sum eru gjørdar, at avgjaldið á rúsdrekka skal broytast. Tískil var tað óivað eitt mistak, at setningurin "reint alkohol" er strikaður.

Fyri at ivi ikki skal vera um, at talan er um avgjald á pr. ltr. reint alkohol, verður eftir uppskotinum punkt avgjaldið fyri vørunr. 2208.20.12 til 2208.90.99 orðað sum 330 kr. pr. ltr. reint alkohol í Frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Viðmerking til stavirnar GWP
Viðmerkjast skal, at stavirnir GWP, sum verða nevndir í teiginum "vøruslag" fyri nýggju vørunummurini (f-gassini) í kapitlunum 28, 29 og 38 merkja "Global Warming Potential". *Global Warming Potential* kann týðast til *alheims upphitingarvirðið* og er eitt mát fyri, hvussu nógva alheims upphiting eitt evni hevur við sær. Evnið CO_2 hevur eitt GWP á 1.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá:

- Sjóvinnustýrinum
- TAKS
- Almanna- og mentamálaráðnum
- Føroya Reiðarafelag
- Vinnuhúsinum
- Arbeiðs- og brunaeftirlitinum
- SEV
- Kølimontørum í Føroyum

- Heilsumálaráðnum
- Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum
- Løgmálaráðnum
- Umhvørvismálaráðnum
- Barna- og útbúgvingarmálaráðnum
- Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Lógaruppskotið hevur eisini verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum í tíðarskeiðinum 15. august 2023 til 5. september 2023.

Fíggjarmálaráðið móttók ummæli av lógaruppskotinum frá Føroya Reiðarafelagi og Vinnuhúsinum.

Vinnuhúsið sigur seg taka undir við at fara undir eina tilgongd fyri at fáa umlagt køliskipanir við f-gassi, so útlatið av vakstrarhúsgassi minkar. Vinnuhúsið sigur tó, at fyri vinnuna verður tað eitt stórt og kostnaðarmikið tak at fáa skift út verandi skipanir. Sambært Vinnuhúsinum eru um 1.000 køliskipanir við f-gassi á landi og umborð á føroyskum skipum. Skal skiftið eydnast væl, er neyðugt at umleggingin er væl fyrireikað.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við hesum, og mett verður, at hetta málið við at fáa umlagt køliskipanir við f-gassi í eini skiftistíð á um 15 ár er fyrireikað so væl, sum til ber. Vinnuhúsið sigur eisini, at avgjøldini við broytingaruppskotinum verða á sama prísstigi sum í grannalondunum og hægri fyri f-gass við høgari vakstrarhúsávirkan.

Ætlanin við at leggja avgjald á f-gass byggir á eina meginreglu um, at tað eigur at fylgja ein kostnaður við at brúka evni, sum hava dálking og útlát av veðurlagsgassi við sær. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at sleppast kann undan, at tað verður dýrari at brúka hesi evni í eini skiftistíð, meðan skiftið fer fram til aðrar køli- og frystiskipanir.

Vinnuhúsið vísir á, at at við ætlaðu avgjøldunum fer kostnaðurin á f-gassi at tvífaldast, og at hetta fer at skunda undir umleggingar til aðrar køliskipanir.

Vinnuhúsið vísir eisini á, at ógreitt er, nær ein innsavningar- og burturbeiningarskipan fyri f-gass kann setast í verk. Vinnuhúsið mælir til at bíða við at seta í verk avgjøldini til innsavningar- og burturbeiningarskipanin er tøk, tí avgjøldini í ringasta føri kunnu gera, at f-gass av neyð verður latið út í luftina.

Fíggjarmálaráðið tekur ikki undir við hesum sjónarmiðinum og metir ikki, at ein innsavningar- og burturbeiningarskipan er avgerandi fyri, um hesi avgjøldini fara at virka eftir ætlan. Fíggjarmálaráðið sær ikki orsakir til, at hetta skuldi verið ein vandi. Nevnast kann eisini, at avgjøldini á f-gass eru munandi hægri í Noregi enn í øðrum Norðurlondum fyri at fíggja skipanina við panti, sum er í Noregi. Tílík skipan er bara í Noregi av okkara grannalondum.

Fíggjarmálaráðið mælir frá at útseta gildiskomuna fyri avgjøld nøkur ár, til dømis til 2026 ella 2027.

Føroya Reiðarafelag vísir í hoyringarskrivinum á, at talan er um týðandi broytingar fyri tey skip, sum nýta ymisk sløg av HFC-gassi, sum nú gerast munandi meira kostnaðarmikið at keypa og nýta. Føroya Reiðarafelag ásannar eisini, at ávís sløg av f-gassi skulu ikki nýtast um

nøkur ár sum liður í einum felags veðurlagspolitikki, ið er ásettur í altjóða sáttmálum. Tó heldur Føroya Reiðarafelag tað vera neyðugt, at skiftistíðin verður skipað soleiðis, at tey fiskiskip, sum nýta hesi f-gass, hava ein rímiligan møguleika at leggja um til aðrar skipanir ella at skifta skipini út við nýggjari skip.

Fíggjarmálaráðið tekur sum heild undir við hesum. Endamálið við avgjøldunum er júst at skunda undir umleggingina til aðrar køliskipanir. Fíggjarmálaráðið ásannar, at avgjøldini fara at dýrka raksturin av køli- og frystiskipanum, sum brúka f-gass sum kølievni. Eitt atlit hjá Fíggjarmálaráðnum í sambandi við hetta málið er eisini, at ynskiligt er ikki, at eldri skip við eldri køli- og frystiskipanum, sum brúka f-gass sum kølievni, verða innflutt til Føroyar úr grannalondunum ella aðrastaðni frá.

Føroya Reiðarafelag vísir á, at serliga avgjøldini í kapitlunum 29 og 38 í frumskjali 1 til toll- og vøruskránna fáa avleiðingar fyri fiskiskip, og at hetta fer at hækka rakstrarkostnaðin hjá fleiri fiskiskipum. Sambært Føroya Reiðarafelag nýta í dag um 25 føroysk fiskiskip ymisk sløg av f-gassi, sum fáa avgjøld á við innflutningi, verður lógaruppskotið samtykt.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at broytingarnar í løgtingslógini um avgjøld á framleiðslu og innflutningi í sambandi við avgjøldini á f-gass fara at dýrka raksturin av teimum skipum, sum hava eldri køli- og frystiskipanir og sum ikki kunnu leggja um til nýggjar skipanir, til dømis tí at skipini eru gomul. Broytingarnar fara eisini at dýrka raksturin av eldri køli- og frystiskipanum á landi, til íløgur verða gjørdar í at leggja um til nýggjar køli- og frystiskipanir.

Endamálið er at skunda undir hetta skiftið til nýggjar skipanir. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at sleppast kann undan, at tað verður dýrari at brúka hesi evni í eini skiftistíð, meðan skiftið fer fram til aðrar køli- og frystiskipanir.

Føroya Reiðarafelag vísir á, at sonevnda Kigalið-ískoytið frá 2016 um útfasing av HFC-gassi ikki sigur nakað um, at avgjøld skulu leggjast á HFC-gass. Tað er rætt, sum Føroya Reiðarafelag vísir á, at avgjøld ikki eru kravd sambært Kigali-ískoytinum. Avgjøld eru kortini ein háttur at skunda undir, at nýtslan av f-gassi minkar. Annað er ikki í tí, at víst verður til Kigali-ískoytið í lógaruppskotinum.

Føroya Reiðarafelag finst í ummælinum av lógaruppskotinum at, at landsstýrið ikki ætlar at nýta peningin til til dømis stuðul til umlegging til aðrar køli- og frystiskipanir hjá fiskiskipum. Fíggjarmálaráðið og Umhvørvis- og vinnumálaráðið fara at viðgera, um tað hevði verið ein loysn at stuðlað vinnuni í at leggja um til aðrar køli- og frystiskipanir. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at tað málið kann knýtast beinleiðis til hetta lógaruppskotið. Tað eigur heldur at verða viðgjørt sum eitt sjálvstøðugt átak innan umhvørvisøkið.

Føroya Reiðarafelag vísir eisini á, at orðingin í lógaruppskotinum, at *"hjá vinnuni ber til at sleppa undan hesum meirkostnaðinum við at leggja um til onnur natúrlig kølievni (CO2 og ammoniak)"* ljóðar ómakaleys og at tað ikki er so einfalt at leggja um. Fíggjarmálaráðið ásannar, at orðingin kann skiljast soleiðis, at tað er eitt lítið og ómakaleyst mál at leggja um eldri køliskipanir umborð á fiskiskipum. Tað er rætt, at talan er um stórar íløgur, ið skulu gerast hjá fleiri skipum fyri at leggja um til onnur kølievni, og at í summum førum er íløgan so stór, at tað loysir seg líka væl at keypa onnur skip.

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at avgjøld kunnu setast á f-gass, og at nýtslan av f-gassi kann minkast burtur, uttan at hetta fer at dýrka raksturin hjá summum skipum, sum hava eldri køli-

og frystiskipanir, sum brúka f-gass. Fíggjarmálaráðið metir ikki, at tað hevði borið til at minkað nýtsluna av f-gassi burtur innan eitt ávíst tíðarskeið bara við at ásett freistir fyri, nær f-gass ikki kann brúkast longur.

Føroya Reiðarafelag heldur, at uppskotið ber brá av at vera eitt inntøkutiltak hjá landskassanum, har endamálið er at fáa til vegar inntøkur til landið heldur enn at stuðla undir eina grøna umlegging í føroyska flotanum til meira umhvørvisvinaligar loysnir. Fíggjarmálaráðið vísir aftur, at talan bara er um at fáa til vegar inntøkur til landið. Endamálið við lógaruppskotinum er at skunda undir eina minking í nýtsluni av f-gassi.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Verða avgjøld løgd á innflutning av f-gassi, verður ein meirinntøka til landskassan av hesum.

Leysliga og við støði í innflutninginum av f-gassi síðstu árini kann metast, at árliga meirinntøkan verður 10-15 mió. kr. frá 2024, um avgjøldini vera á leið á sama stigi sum í grannalondunum, sum lógaruppskotið leggur upp til. Árliga meirinntøkan fer síðani at minka stigvíst fram til 2036, tá ið innflutningurin av f-gassi væntandi er minkaður eini 85% sambært kunngerðini um f-gass, sum er sett í gildi (kunngerð nr. 110 frá 16. oktober 2023 um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, sum inniheldur fluor, F-gasskunngerðin).

Ætlanin er, at partar av inntøkuni til landskassan skulu fíggja eina góðkenda innsavningar- og burturbeiningarskipan fyri f-gass, sum IRF ætlandi fer at umsita. Endamálið við hesum er at tryggja, at brúkt f-gass ikki verður latið út í luftina. Landsstýrið ger avtalu við IRF um fígging av hesi skipan. Greitt er tó ikki enn, nær ein tílík innsavningar- og burturbeiningarskipan fyri f-gass kann setast í verk.

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar við sær fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær, at tað verður dýrari hjá vinnuni at innflyta f-gass frá 1. januar 2024. Hjá vinnuni ber til at sleppa undan hesum meirkostnaðinum við at leggja um til onnur natúrlig kølievni (CO_2 og ammoniakk). Tær skipanirnar eru tøkar, og nýtslan er í vøkstri. Hesi evnini gera tað møguligt at skifta til onnur kølievni næstu 10-15 árini. Talan verður kortini um eina útreiðslu av at skifta til køliskipanir við øðrum kølievnum, tí íløgur skulu gerast í nýggjar køliskipanir. Í tíðarskeiðnum, har ið skiftið fer at fara fram, verður dýrari at reka tær gomlu køliskipanirnar, til dømis umborð á skipum, sum brúka f-gass sum kølievni.

Sambært uppskotinum verða avgjøldini á leið á sama stigi pr. kg. av innflutningi sum í grannalondunum. Harvið vera avgjøldini ikki kappingaravlagandi.

Nakað av umsiting verður fyri vinnuna av uppskotinum, tí frameftir skulu fyritøkur, sum eru góðkendar til at innflyta f-gass, rinda avgjald við innflutning, sum verður gjørt í sambandi við tolling.

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur við sær positivar avleiðingar fyri umhvørvið.

Hugtakið f-gass er felagsheiti fyri ymisk sonevnd *sterk vakstrarhúsgass*, sum innihalda flour. Útlátið av f-gassi hevur týdning fyri veðurlagsbroytingarnar og samlaðu alheims upphitingina, tí f-gass hava í nøgd lutfalsliga størri upphiting við sær pr. vekt. Til dømis hevur útlátið av

einum kilo av f-gassinum R-507a, sum er nógv brúkt í Føroyum, við sær á leið somu alheims upphiting sum útlátið av 4 tonsum av CO2.

Lógaruppskotið er tí ein liður í at røkka mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eins og nevnt frammanundan, hava Føroyar bundið seg til altjóða Wien-sáttmálan um verju av ozonlagnum frá 1985 og til Montreal-protokollina um ozonoyðandi evni frá 1987. Montreal-protokollin hevur síðani fingið fleiri ískoyti, undir hesum Kigali-ískoytið frá 2016 um útfasing av HFC-gassi, sum er ein bólkur av f-gassi. HFC-gass er sterkt vakstrarhúsgass, sum sambært Kigali-ískoytinum skal útfasast fyri at verja jørðina móti mannaskaptum veðurlagsbroytingum.

Aðrir millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingareru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Við uppskotinum verður avgjald lagt á innflutning av f-gassi, sum verður brúkt í køliskipanum í Føroyum. Sambært uppskotinum verður avgjaldið áleið á sama stigi pr. kg. av innflutningi sum í grannalondunum. Harvið vera avgjøldini ikki kappingaravlagandi.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nýtt frumskjal 1 í skjali 1 verður sett í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi við seinni broytingum. Í frumskjali 1 eru gjørdar ávísar rættingar, umframt at f-gassið er sett inn í kapitlarnar 28, 29 og 38 í frumskjali 1. Rættingarnar til frumskjal 1 í skjali 1 í lógini eru gjørdar sambært tilmæli frá TAKS og í samráði við TAKS.

Rættingarnar til frumskjal 1, sum eru gjørdar í samráði við TAKS, eru lýstar niðanfyri:

Striking av gatt-tolli í Frumskjali 1 í skjali 1
Í Frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi er gatt-tollur á 4,7 % og 3,7 % lýstur fyri nakrar vørur í vørubólki 2710, sum er oljuúrdráttir. Gatt-tollurin er lýstur í næstu kolonnu undir punkt avgjald. Mett verður, at talan er um ein feil, sum er gjørdur í sambandi við eina lógarbroyting. Gatt-tollur skal ikki lýsast í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Gatt-tollur skal av røttum lýsast í løgtingslóg um toll. Viðmerkjast skal, at í hesum føri er gatt-tollur lýstur fyri vørurnar í løgtingslóg um toll.

Eftir uppskotinum verður gatt-tollurin á 4,7% í Frumskjali 1 í skjali strikaður fyri niðanfyristandandi vørunr.:

2710.12.41, Blýfrítt bensin undir 0,013 gr.pr. ltr. oktan undir 95.
2710.12.45, Blýfrítt bensin undir 0,013 gr.pr. ltr. oktan undir 98.
2710.12.49, Blýfrítt bensin undir 0,013 gr.pr. ltr. oktan yvir 98.
2710.12.51, Blýggjað bensin yvir 0,013 gr.pr. ltr. undir oktan 98.
2710.12.59, Blýggjað bensin yvir 0,013 gr.pr. ltr. yvir oktan 98.
2710.12.90, Lættar oljur
2710.19.25, Petroleum
2710.19.29, Paraffin olja

Eftir uppskotinum verður gatt-tollurin á 3,7% í Frumskjali 1 í skjali 1 á niðanfyristandandi vørunr. eisini strikaður:

2710.19.81 Ljós smyrjiolja
2710.19.83 Hydraulikolja
2710.19.85 Hvítar oljur, paraffinum liquidum
2710.19.87 Gearolja

Sundurbýting av avgjaldi á smyrjioljum
Avgjald á vørunr. 2710.19.81, ljós smyrjiolja, 2710.19.83, hydraulikolja, 2710.19.85, hvítar oljur, paraffinum liquidum og 2710.19.87, gearolja er lýst í bæði løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og í løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju. Avgjaldið hevur samlað sæð verið 3,20 kr. pr. ltr. Avgjaldið hevur verið býtt soleiðis, at 0,70 kr. pr. ltr. koma frá løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og 2,50 kr. pr. ltr. koma frá løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju.

Tá ið løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi bleiv broytt í 2015, varð avgjaldið á smyrjiolju broytt frá 0,70 kr. pr. ltr. til 2,70 kr. pr. ltr. Tað framgongur tó ikki av

viðmerkingunum til lógarbroytingina, at avgjaldið á smyrjiolju skuldi hækkast. Talan er óivað um ein feil, sum er gjørdur í sambandi við lógarbroytingina. Viðmerkjast skal, at TAKS eisini aftaná lógarbroytingina hevur kravt inn 3,20 kr. pr. ltr., og at Fíggjarmálaráðið er kunnað um hetta.

Eftir uppskotinum verður avgjaldið í Frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi broytt til 0,70 kr. pr. ltr. fyri hesi vørunr.:

2710.19.81 Ljós smyrjiolja
2710.19.83 Hydraulikolja
2710.19.85 Hvítar oljur, paraffinum liquidum
2710.19.87 Gear olja

Nágreining av rúsdrekka í Frumskali 1 í skjali 1
Rúsdrekka, sum kemur undir vørunr. 2208.20.12 til 2208.90.99, hevur avgjald á 330 kr. pr. ltr. Í lógini frá 2002 varð ásett, at avgjaldið skuldi vera 330 kr. pr. ltr. reint alkohol. Setningurin "reint alkohol" er onkursvegna blivin strikaður, tá ið broytingar eru gjørdar í lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Nevnt er ikki í viðmerkingunum til broytingarnar, sum eru gjørdar, at avgjaldið á rúsdrekka skal broytast. Tískil var tað óivað eitt mistak, at setningurin "reint alkohol" er strikaður.

Fyri at ivi ikki skal vera um, at talan er um avgjald á pr. litur reint alkohol, verður eftir uppskotinum punkt avgjaldið fyri vørunr. 2208.20.12 til 2208.90.99 orðað sum 330 kr. pr. litur reint alkohol í Frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Viðmerking til stavirnar GWP
Viðmerkjast skal, at stavirnir GWP, sum verða nevndir í teiginum "vøruslag" fyri nýggju vørunummurini (f-gassið) í kapitlunum 28, 29 og 38 merkja "Global Warming Potential". *Global Warming Potential* kann týðast til *alheims upphitingarvirðið* og er eitt mát fyri, hvussu nógva alheims upphiting eitt evni hevur við sær. Evnið CO_2 hevur eitt GWP á 1.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 03. november 2023

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Føroya Reiðarafelag